## Skeiðsrøð innan

# mentalisering í arbeiðinum við børnum, ungum og vaksnum, ið hava verið fyri vansorgan

Í seinnu árshálvu í 2015 skipar Barnaverndarstova Føroya saman við Eind 10 í Almannaverkinum fyri skeiðum, ið venda sær til fólk, sum arbeiða við børnum, ungum og vaksnum, ið hava verið fyri vansorgan. Á skeiðunum

- ogna luttakararnir sær vitan um ástøði og grundreglur í mentaliseringsgrundaðari viðgerð við denti á børn, ung og vaksin, sum hava verið fyri vansorgan. Kunnleiki fæst um serstøk evni í sambandi við mentaliseringsgrundaða viðgerð og námsfrøði, her í millum *mentaliseringsmappuna*, greining av mentaliseringsførleikum, ikki-mentaliserandi støðum hjá ungum og vaksnum við persónleikaólagi, sálarløstum og reingingum.
- gerast luttakararnir førar fyri at nýta grundreglur og háttaløg frá mentaliseringsgrundaðari viðgerð í dagligu arbeiðsgongdini.
- verður ástøði og starvsøkið hjá luttakarunum samantvinnað.

Skift verður millum undirvísing og venjing. Ástøðið handan mentalisering verður lýst við dømum og frágreiðingum.

Skeiðini eru ætlað sálarfrøðingum, sosialráðgevum og námsfrøðingum, ið arbeiða við børnum, ungum og vaksnum, ið hava verið fyri vansorgan.

Kostnaðurin fyri øll skeiðini, ið verða hildin í Norðurlandahúsinum (tó ikki tað fyrsta, ið fer fram í Losjuni, Tinghúsvegur 18), er 6000 krónur, og luttakararnir fáa skeiðsváttan eftir lokna útbúgving. Áhugaði verða biðin um at melda seg til skeiðini hjá Barnaverndarstovuni. Tey sum starvast innan barnaverndartænasturnar kring landið, eins og tey, ið starvast á barnaverndarstovnum undir Almannaverkinum, hava framíhjárætt.

Skeiðsrøðin er býtt soleiðis upp:

**Hósdagin 20. august, dagur 1**
*Mentalisering og menning av mentaliseringsførleikum*
*Undirvísari: Janne Østergaard Hagelquist*

- Innleiðsla til hugtakið mentalisering. Mentalisering í menningarligum høpi. Hvørja ávirkan hevur tilknýti á menningina av mentaliseringsførleikum?
- Grundleggjandi hugsanin í mentaliseringsgrundaðari viðgerð, mentaliserandi mótvegis ikki-mentaliserandi samspæli
- Mentaliseringsmappan, við týðandi hugtøkum og námsfrøðiligum amboðum, verður løgd

fram.

**Fríggjadagin 21. august, dagur 2**
*Mentalisering, sálarløstir og menningarsálarløstir*
*Undirvísari: Janne Østergaard Hagelquist*

- Sambandið millum sálarløstir og mentalisering
- Ymisk sløg av sálarløstum og PTSD
- Ávirkan av sálarløstum og menningarsálarløstum á børn
- Venjing í mentaliseringsgrundaðum arbeiðshættum, m.a. STORM-myndlinum
- Hvussu skal reingjan hjá børnum og ungum skiljast og handfarast: Handfaring av reingjan í gerandisdegnum í arbeiðinum við børnum og ungum, ið hava verið fyri vansorgan.
- Harðskapur og ógvusligur atburður: Kunning um, hvussu harðskapur frá teimum, ið annars hava umsorganina fyri einum barni, ávirka tey, og hvussu til ber at varnast tekin um harðskap.

**Hósdagin 8. oktober, dagur 3**
*Mentaliserandi samspæl, mentaliseringsførleiki hjá foreldrum og yrkislærdum*
*Undirvísari: Anne Blom Corlin*

- Eyðkenni við mentaliserandi og ikki-mentaliserandi samspæl
- At fremja mentalisering – meginreglur fyri mentaliserandi samrøður við ung og foreldur
- At arbeiða á *psykoeduktivan hátt* við ungum, ið hava menningarløstir

**Hósdagin 12. november, dagur 4**
*STORM-myndilin & mentaliseringsmappan*
*Undirvísari: Helle Hundahl*

- Innleiðsla í STORM-myndilin sum eitt kjarnuamboð í arbeiðinum við børnum og ungum, ið eru sett heiman
- Innleiðsla í mentaliseringsmappuni
- Skift verður millum ástøðiligar framløgur og venjingar á felagsfundi og í minni bólkum

**Fríggjadagin 13. november, dagur 5**
*Mentalisering í námsfrøði og viðgerð. Mentaliseringsmappan (framhald). Reingjanir í arbeiðinum við børnum og ungum, ið hava verið fyri vansorgan.*
*Undirvísari: Helle Hundahl*

- Mentalisering í námsfrøði og viðgerð
- Fatan og viðgerð av reingjanum í samspælinum við børn og ung, ið hava verið fyri vansorgan
- Venjingar úr mentaliseringsmappuni

### Um teir tríggjar undirvísararnar:

**Janne Østergaard Hagelquist** er góðkendur sálarfrøðingur og serfrøðingur í barnasálarfrøði og supervisjón. Hon hevur í nógv ár arbeitt við viðgerð av børnum, ungum og familjum, sum hava verið fyri vansorgan, ágangi og øðrum harðskapi. Eisini hevur hon royndir við at veita supervisjón og undirvísa starvsfólki, ið arbeiða við børnum og ungum, ið hava verið fyri vansorgan, eins og og foreldrum teirra. Í 2012 gav hon út bókina ”Mentalisering i mødet med udsatte børn og unge”, og í 2013 skrivaði hon saman við øðrum bókina ”Døgninstitutionspædagogik”. Á vári 2014 kom so bókin ”Mentalisering i pædagogik og terapi”.

**Anne Blom Corlin** er góðkendur sálarfrøðingur og nemur sær í løtuni serútbúgving í sálarviðgerð. Hon hevur áður verið partur av eini Phd.-verkætlan í menningarsálarfrøði við University of California og hevur samstarvað við Dr. Ross Thompson, ið granskar innan tilknýti. Anne hevur síðan 2006 starvast sum sjálvstøðugur ráðgevi í supervisjón, við undirvísing og við viðgerðaruppgávum innan fosturfamiljuøkið. Hon hevur breiðar arbeiðsroyndir innan kliniska sálarfrøði hjá vaksnum. Í løtuni starvast hon á Psykoterapeutisk Center Stolpegård, sum er viðgerðarstovnur fyri strongd og sálarløstir.

**Helle Hundahl** er góðkendur sálarfrøðingur og er í holt við serútbúgving í sálarviðgerð. Hon er útbúgvin innan relationella sálarviðgerð, parviðgerð við serligum denti á mentalisering og sum vegleiðari innan mindfulness. Helle hevur drúgvar royndir í sínum starvi við familjum, sum hava verið fyri harðskapi, bæði sum sálarfrøðingur og sum deildarleiðari í *Dialog mod Vold* í Keypmannahavn. Afturat hesum hevur Helle arbeitt við børnum og familjum á stovnum. Helle hevur serliga áhuga fyri, hvussu mentaliseringstrot hevur eina ónda ringrás við sær í parløgum og familjum.